# Kjak

Pauli Gregor Hentze

## Dead line nærkast

Nú eru bara nakrir fáir tímar eftir. Ein avgerð verður skjótt tikin kæri skattgjaldari. Verða 600 milliónir (í minsta lagi) stolnar frá okkum, ella kunnu vit sova trygg?

Vit eiga øll at vita, at vit hava sett revin at vakja yvir høsnunum, so útlitini eru ikki ov góð? og tó!!

Vit avgera tað sjálvi, seta vit okkum í kvøld at hyggja í opiumskassan, at fylgja við í dagliga lívinum hjá føroysku forsetisfrúuni, meðan revurin etur høsnini og eggini, ella velja vit at fara út í høsnagarðin at verja borg. Valið er okkara.

Síðstu ferð gekk ikki ov væl. Vit mistu 3,5 milliardir eittkrónu egg, og 7000 høsn flýddu knokkroytt av landinum. Tá vóru vit vánaligir verjar. Vit tagdu og lótu standa til. Syndarligt!!!

Men hesaferð hava vit møguleikan at bera eitt sindur í bøtuflaka, at vinna eitt sindur av tygnini aftur, at vinna rættin aftur at hyggja inn í eyguni á børnum okkara, og siga við tey, at vit stríddust tað besta vit kundu fyri framtíð teirra.

Men tað er at samlast skjótt. Latið frumskógartrummurnar látu um geilarnar. Saman standa vit sterk. Gloymi floksmørk, gloymið gamalt agg, hetta hevur ov stóran týðning, smákeglið má bíða. Vit borgarin eiga hetta landið, politikarar eru valdir at tæna okkum, ikki at stýra okkum. Vit eiga alt valdið. Og tá ið órætturin gerst ov stórur, eiga vit amboðið, ið eitur sivilt ólýdni. Tað kann eingin taka frá okkum, eingin lógartekstur, einki annað vald.

So taki stýrisvølin beinan vegin góðu landsmenn og góðu landskvinnur, í morgin er ov seint, tá eru vit grunnsigld.

Ikki einaferð enn!!!

Hjalmar Hansen
*aðalskrivari í Bláa Krossi Føroya*

## Blái Krossur fegnast um »Drekk sum minst« fráboðanina frá Fólkaheilsuráðnum

»Drekk sum minst« er boðskapurin frá Fólkaheilsuráðnum, eftir at danska Sundhedsstyrelsen hevur broytt síni tilmæli, tá tað kemur til rúsdrekka nýtslu.

Blái Krossur fegnast um hesa greiðu fráboðan frá Fólkaheilsuráðnum, sum samstundis slær fast, at eingin eigur at nýta rúsdrekka av heilsuávum.

Tað er ógvuliga týdningarmikið, at ein almennur stovnur kemur við eini slíkari fráboðan. Tað munnu vera mong ár síðani, at so greið boð eru komin frá almennari síðu, tá tað snýr seg um rúsdrekka.

### Rúspolitisk mál

Eitt er tó boðskapurin, annað er at seta tiltøk í verk, sum eggja undir at hetta gerðst veruleiki. Og tað er neyðugt. Vit í Bláa Krossi hava fyrr tilmælt, at vit í Føroyum eiga at seta okkum tað alkoholpolitiska mál, at miðalnýtslan skal vera 6 litrar í 2015.

Fyri at minka um rúsdrekkanýtsluna, eru nógv ymisk tiltøk, sum kunnu setast í verk. M.a.

- at øll søla av rúsdrekka fer fram gjøgnum Rúsuna
- at skipanin við skeinkiloyvum verður gjøgnumgingin og broytt
- at ásetingarnar um lýsingar fyri rúsdrekka vera herdar og fylgdar
- at allir partir samstarva um eitt munadygt fyribyrgingararbeiðið, soleiðis at ung útseta aldurin nær rúsdrekka verður roynt.

At almennu Føroyar stuðla aktivt upp undir málsetningin, m.a. við at útnevna 2012 til at vera "Rúsavmarkningar-ár".

Rúsdrekka er ikki sum ein og hvør onnur vøra. Tær persónligu, sosialu og samfelagsligu avleiðingarnar av rúsdrekkanýtslu eru grundleggjandi neiligar. Tí skal rúsdrekka heldur ikki viðfarast sum ein og hvør onnur vøra.

FRAMTAK
FRAMTAKSGRUNNUR FØROYA

# Málsviðgeri

Framtak bjóðar áhugaðum at søkja fjølbroytt og spennandi starv sum málsviðgeri. Tú kemur í tøttum samstarvi við stjóran at arbeiða við vinnuligum menningarætlanum og verða við til at menna Framtak til ein virknan íleggjara í føroyskt vinnulív.

**Arbeiðsuppgávur í samstarvi við stjóran**
- Fyrireika tilfar til nevndina fyri Framtak
- Samskifta við umsøkjarar, eftirkanna og meta um umsóknir og virði
- Menna sáttmálar og avtalur
- Uppfylging av gjørdum íløgum
- Samskifti við vinnu og íleggjarar
- Viðlíkahald av heimasíðu Framtaks

**Førleikar**
Umsøkjarin skal hava:
- høskandi útbúgving frá hægri lærustovni
- góð evni at greina, gott yvirlit og evni at raðfesta uppgávurnar
- góðan málsligan førleika á føroyskum og enskum
- góð samstarvsevni og evni at arbeiða sjálvstøðugt

Vit vænta, at tú ert framsíggin og opin fyri at finna loysnir. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan løgfrøði og/ella búskap frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum.

**Setanartreytir**
Setanarviðurskifti og løn verða ásett eftir avtalu.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. oktober 2010.

Umsóknin skal sendast til:
Framtaksgrunnur Føroya
J. H. Schrøtersgøta 20
Postboks 3157
110 Tórshavn

ella um teldupost ndw@framtak.fo.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Niels Dann West, stjóra, á telefon 315966 ella 217548.

**Um Framtak**
Framtak skal eftir marknaðartreytum hava ein virknan leiklut sum kveikjari í føroyskum vinnulívi. Endamálið hjá Framtak er at virka fyri at menna og fjøltáttað føroyskt vinnulív samfelagnum at gagni. Framtak er vinnurekandi grunnur, sum eftir marknaðartreytum veitir framtakskapital við at seta partapening í og/ella veita ábyrgdarlán til nýggjar fyritøkur og eldri fyritøkur, sum víðka um virksemið, skulu endurreisast og/ella ganga nýggjar leiðir.

Gjøgnum sítt virksemi sum vágafúsur og tolin íleggjari hevur Framtak møguleika at menna vinnur, har nýskapan og langtíðarætlanir eru neyðugar, og fíggjarligi vinningurin er frammi í tíðini.

Framtak samstarvar við aðrar fíggjarligar íleggjarar at lyfta í felag, har váðin er stórur.

sansir.fo

www.sosialurin.fo

Haldaragjald!!!

Hava tit minst til at gjalda haldaragjaldið fyri oktober ársfjórðingin?

Steðgidagur nærkast

Sosialurin